# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 5/2025**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: AB kærir NSÍ fyri brúk av ólógligum leikara, U21 dreingir** | |
| Deild: U21 Dreingir, Bólkur A | Hvør hevur reist málið: AB |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 24.09.2025 |
| Møguligt brot framt: 17.09.2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | FSF-ummæli: Ja |

## Úrskurður

Staðfest er, at NSÍ U21 dreingir høvdu ein leikara á sínum liði í dysti móti AB leiktur 17. september 2025, sum ikki er skrásettur sum leikari hjá NSÍ. Talan er um leikaran Viktor Jæger Pedersen. Leikarin leikti undir navninum á øðrum leikara hjá NSÍ.

Mong fordømi eru um, at felag verður dømt at tapa dyst fyri brúk av ólógligum leikara. Mong fordømi eru eisini um, at felag fær bót fyri at svika við nøvnum á dómaraseðilinum.

NSÍ verður dømt at tapa dystin móti AB leiktur 17. september 2025 við málmuninum 0-3 fyri brúk av einum ólógligum leikara, við tað at hesin ikki hevur skrásett leikaraloyvi í felagnum. Fyri svik við einum navni á dómaraseðilinum fær NSÍ eisini 2.000,- kr. í bót.

Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í § 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Bótin til NSÍ er ásett við heimild í grein 6, bókstav c í 1. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini.

Einans úrskurðurin um, at NSÍ er dømt at tapa dystin, kann kærast til Yvirkærunevndina. Freistin at kæra er 5 dagar.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

AB kærir NSÍ fyri brúk av ólógligum leikara við tað at ein navnnevndur leikari, sum ikki hevur leikaraloyvi hjá NSÍ, leikti við NSÍ undir navninum á einum øðrum NSÍ-leikara.

NSÍ hevur í partshoyringini viðgingi lógarbrotið.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar um nevnda leikara. Staðfest er, at kæran snýr seg um brúk av leikara, sum ikki hevur leikaraloyvi í NSÍ.

## Lógarverkið

Sambært grein 15 í Kappingarreglunum, skal leikari tilmeldast leikaraskráseting FSF's og er leikarin at meta sum lógligur leikari fyri tað felagið, leikarin er skrásettur hjá.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

Sambært grein 6 í Kappingarreglunum fyri yngri deildir, skal COMET skipanin brúkast í staðin fyri dómarakort og leikaraváttan og leikaralistin skal verða gjørdur í COMET skipanini, áðrenn dystur verður leiktur.

Sambært grein 28 í Kappingarreglunum, skulu allir leikarar skrásetast á dómaraseðilin.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at NSÍ brúkti ein leikara, sum ikki hevði leikaraloyvi í felagnum og sum leikti undir følskum navni á dómaraseðilinum í dystinum móti AB.

Aga- og etiskanevndin metir, at tað hevur týdning, at feløgini virða dómaraseðilin og tann týdning, hann hevur sum amboð fyri gjøgnumskygni og eftirlit.

Svik við nøvnum á dómaraseðilinum er brot á regluverk FSF´s, sum hóttir ítróttarliga integritetin í kappingum fyriskipaðar av FSF. Fleiri fordømi eru um, at feløg eru dømd at tapa dyst við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikarum, umframt at fordømi eisini eru um at feløg eru áløgd bót fyri svik og fusk við nøvnum á dómaraseðilinum.

Aga- og etiskanevndin hevur áður revsa leikarar persónliga fyri at hava leikt dyst undir følskum navni, sí t.d. kæru 1/2024 og 3/2024. Í hesum ítøkiliga føri hevur nevndin tikið avgerð um ikki at revsa persónliga, av tí at umrøddi leikarin ikki hevur leikaraloyvið í NSÍ ella øðrum føroyskum felagi.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10, litra f í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin um at NSÍ tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. oktober 2025**

Eli Thorsteinsson

Eli Thorsteinsson
formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður
- Ken Nónklett, næstformaður
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur
- Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur